# Starvsfólk til In•tone clinic



Søkt verður eftir sjúkrarøktarfrøðingi – ella fólki við líknandi útbúgving – í 30 ella 40 árs aldrinum at arbeiða nakrar tímar um vikuna.

Meira fæst at vita um In•tone á www.intone.dk, og um hetta starvið við at ringja á tlf. 322045/522045.

Send skrivliga umsókn til Sannu Hentze, Fugloyarvegur 10, 100 Tórshavn ella e-mail: sanna@spirin.fo

Starvið verður sett skjótast gjørligt.

in•tone clinic
ALL IN ONE SKØNHEDSCLINIC

J. Paturssonargøta 18
Tórshavn · Tel 322045

---

STARVSLÝSING

## Arbeiðsfólk til vegamerkingina

Sóknast verður eftir einum røskum persóni (m/k) til eitt spennandi starv á málingaliðnum hjá Landsverki.

**Arbeiðsuppgávur**
Saman við einum vælvirkandi liði ert tú við til at halda vegamerkingina á landsvegunum. Hetta merkir, at tú fært eitt fjølbroytt arbeiði, ið til tíðir er kring alt landið. Arbeitt verður av og á um náttina.

Vetrarhálvuna fert tú at luttaka í vetrarhaldinum, ið hevur til uppgávu at grava kava og at boða frá um hálku. Aftur at hesum fert tú til tíðir at arbeiða á einum nýggjum tunnilsliði, ið skal gera ymsar uppgávur inni í tunlunum.

**Førleikakrøv**
Tú mást hava vanligt koyrikort og helst eisini koyrikort til lastbil, men hetta er ikki ein treyt. Vit leggja stóran dent á góðar persónligar eginleikar, og at tú ert raskur og arbeiðssamur. Tú fert at arbeiða á einum liði, og vit vænta tí, at tú hevur góð samstarvsevnir og ert nærlagdur og fyrikomandi.

**Setanarviðurskifti**
Løn og setanartreytir annars verða sambært sáttmála við avvarðandi yrkisfelag. Starvið verður sett skjótast gjørligt.

**Umsóknir**
Umsóknir við lívsgongdarlýsing (CV) og møguligum ummælum skulu sendast til:
Landsverk,
Postmoga 78,
FO-110 Tórshavn,
ella við telduposti til lv@lv.fo,
merktar „Arbeiðsfólk til vegamerkingina“.

Umsóknir skulu vera okkum í hendi í seinasta lagi 23. mai 2008. Allar umsóknir verða viðgjørdar í trúnaði. Fleiri upplýsingar um starvið kunnu fáast frá Hans Madsen, formanni á málingaliðnum, á tlf. 540 948, ella frá Fríðriki Heinesen, verkfrøðingi á vegadeildini, á tlf. 540 888 ella fridrik@lv.fo.

Landsverk, Tinghúsvegur 5, Postmoga 78, Tórshavn, | Tel 340 800, Faks 340 801, lv@lv.fo, www.landsverk.fo

LANDSVERK *byggir land*

*Landsverk er stovnur undir Vinnumálaráðnum og hevur um hendi vega-, byggi- og havnamyndugleikauppgávur. Stovnurin ráðleggur og ger ætlanir, útinnir, rekur og viðlíkaheldur landsvegir, havnir, bygningar og tyrlupallar.*

---

margerita

# SØKT VERÐUR EFTIR KRAMBAKVINNU

**Vit leita eftir einum ágrytnum, blíðum og tænastusinnaðum starvsfólki.**

Vit bjóða eitt spennandi og mennandi starv í einum umhvørvi, har tað snýr seg um at veita eina góða tænastu. Kravt verður, at tú ert sera áhugað í klædnamóta og klædnasølu. Tú ert blíð, tænastu- sinnað og ágrýtin. Tú ynskir at mennast og gert tær ómak at veita eina sera góða tænastu, hava áhuga og duga at hjálpa kundanum at velja rætta klædnaplaggi og ert ágrýtin eftir at geva viðskiftafólkunum eitt gott heildarupplivilsi í handlinum.. Kravt verður eisini, at tygum kunnu arbeiða sjálvstøðug.

Hevur hetta tygara áhuga ella eru spurningar um starvið, ber til at ringja til Aibritt á Plógv, tel. 318787 ella 510750.

Margerita í SMS Á Trapputrøði Postboks 1385 110 Tórshavn

---

SAMSKIP



## Skrivstovufólk til Samskip í Kollafirði

Vegna vaksandi virksemi á frystigoymsluni í Kollafirði, søkir Samskip eftir skrivstovufólki at starvast hálva tíð.

Arbeiðið er skráseting av inn- og útgangandi vøru. Fakturering og annað skrivstovuarbeiði. Starvsstaðið er Samskip í Kollafirði.

Vit bjóða eitt spennandi og mennandi starv í einum dynamiskum kappingarumhvørvi. Løn sambært avtalu.

Vit vænta, at tú hevur viðkomandi royndir og útbúgving. Er fyrikomandi og veitir viðskiftafólki eina góða tænastu.

Umsókn skal sendast til:
Samskip p/f
Box 3255
FO-110 Tórshavn
Mrk "umsókn"

Freistin at søkja er 21. mei. Um spurningar eru, kann ringjast til Niels Madsen, deildarleiðara hjá Samskipum í Kollafirði, á tel. 477777 ella við at senda t-bræv til niels.madsen@samskip.com. Starvið verður sett sum skjótast.